
*Bjørg Mohr Andersen borðreiddi við pinnamati afturvið tónleiki og myndlist*


*Bjørg: "Morris", "Mini"*


*Bjørg: "Lívslinjan", "Tíðslinjan"*

dømis improviserað seg fram til, meðan hon lurtaði eftir einum jazzlag á eini skrattandi, gamlari og stemningsfullari upptøku. Kláru litblettirnir eru eitt sindur kantutir og minna ikki sørt um skurrið í útvarpstólinum, um skurr kunnu hava skap ...

## Málaðir til hølið

Hóast Bjørg vil vera við, at hon ikki hugsar serliga nógv um, hvørt hennara myndir eru málaðar listarliga og tekniskt "rætt", so sæst beinanvegin, at hon hevur meir enn bara vanligt innlit í samanbandið millum litir og myndakompositionir. Ráðandi litirnir í øllum myndunum eru teir somu, djúpt reytt og blásvart, sum tóna inn og út í einum at síggja til endaleysum eksperimenti.

- Eg haldi ikki tað ber til at samanlíkna tað at mála og at arbeiða við einum sjónvarpskamera, sum eg geri til dagligt. Og tó, eg hugsi nógv í myndum og dámi væl at royna meg fram við ymsum kompositiónum, tónum, ljósi og skuggum, sigur Bjørg, sum eisini hugsar um, hvar málningarnir skulu hanga, meðan hon málar. Hesir málningarnir eru ikki bara gjørdir til júst hesa framsýningina. Bjørg hevur eisini havt hvítu veggirnar í Smiðjuni í Lítluvík í huga og givið sær far um, hvussu ljós og skuggar falla í hølinum, so rúm og myndir arbeiða saman.

## Pláss fyri hugflognum

Hóast Bjørg ikki hevur tær stóru ambitiónirnar sum listamálari, dugir hon illa at ímynda sær, at hon ikki onkusvegna altíð fer at gera pláss fyri málingini í frítíðini.

- Eg havi altíð teknað og í familjuni eru jú fleiri listamálarar, so tað kennist nátúrligt at hava tað sum frítíðarítriv, sigur Bjørg

Eir dylur hinvegin ikki yvir, at hon framvegis hevur ein dreym um at fara á listaskúla einferð.

- At mála hevur havt mín heilt stóra áhuga, síðani eg var heilt ung, og eg havi eisini tikið okkurt skeið. Men eg vildi ynskt, at eg hevði betri tíð til tað, sigur Eir.

Hví tær mála? Tí tær halda uppá, at tað eigur at vera pláss fyri skapanargleðini, fyri hugflognum í einum stressaðum gerandisdegi og fyri at sleppa at vísa tað fyri øðrum - eisini uttan at tað altíð nýtist at vera eitt so øgiliga djúpt og væl umhugsað endamál við tí.

Komandi viku verður framsýningin "Títt og Mítt" at síggja í Ribarhúsi í Fuglafirði